# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

*– Pávin hevur sama hugsunarhátt, sum fólk høvdu í miðøldini*
*(turkiskur politikari).*

**STUTT SAGT**

## CIA-agentar skulu takast

Nakrir týskir politikarar krevja, at tríggir agentar hjá amerikonsku fregnartænastuni CIA verða handtiknir, tí teir burturfluttu týska ríkisborgaran Khaled el-Masri í januar í 2004.

Upplýsingar, ið spanska løgreglan hevur fingið fatur á, vísa, at teir tríggir agentarnir komu við flogfari til Mallorca. Haðani fóru teir til Makedonia eftir el-Masri og fluttu hann til Afghanistan. Teir næstu fimm mánaðarnar bleiv hann regluliga avhoyrdur og illa viðfarin í einari amerikanskari legu í Afghanistan, til CIA slepti honum leysum í einum skógi í Albania í mai í fjør.

Ein týsk kanningarnevnd hevur kannað upplýsingarnar hjá sponsku løgregluni, og sambært týskum bløðum fer nevndin at krevja, at arbeiðshátturin hjá CIA fær avleiðingar, og at týska stjórnin skal biðja USA um eina almenna frágreiðing um málið. Nakrir týskir politikarar hava longu kravt, at teir tríggir CIA-agentarnir verða tiknir.

Alment arbeiða teir tríggir sum flogskiparar hjá flogfelagnum Aero Contracters, ið sigst vera eitt undirfelag hjá CIA. Týska sjónvarpið hevur verið í North Carolina, har menninir búgva, men teir vildu ikki siga nakað um málið, skriva týsk bløð.

# Russiski kavbátaflotin størri hóttan nú enn undir Kalda krígnum

**Teir russisku kavbátarnir verða ikki hildnir við líka, og manningarnar fáa ikki ta neyðugu venjingina.**

RUSLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Penganeyð ger, at tann eina ferð so stolti russiski herflotin er farin at líkjast einum flota, sum er klárur at senda til upphøggingar. Vantandi viðlíkahald økir vanda fyri vanlukkum, og í seinastuni hava fleiri dømi verið um tað. Í næstsíðstu kom eldur í ein kavbát stutt úr norðurnorsku strondini, og tveir av manningini lótu lív. Hetta er næstan gerandiskostur, og tí er vandi fyri, at vit ein dag kunnu fáa eina vanlukku við geiðslavirknum leka.

Hetta stendur at lesa í einari nýggjari fráhgreiðing um støðuna í russiska herflotanum. Sagt verður, at støðan versnar støðugt, tí eingir pengar eru til viðlíkahald, og tí eru fleiri av teimum nýggjastu skipunum í so vánaligum standi, at tey kunnu eins væl høggjast upp. Frágreiðingin vísir eisini á, at manningarnar fáa alt ov lítla venjing, og at skipini og kavbátarnir eru sjáldan úti.

Í norska umhvørvisvern darfelagsskapinum Bellona stúra tey fyri gongdini. Niels Bøhmer í Bellona sigur við blaðið Finnmarken, at í veruleikanum eru teir russisku kavbátarnir í Barentshavinum ein størri hóttan nú enn undir Kalda krígnum. Kemur eldur í ein av kjarnorkukavbátunum har, og ættin liggur at landi, kann tað fáa álvarssamar avleiðingar.

– Reaktorurin í einum kavbáti er bara ein tíggjundapartur av tí, sum kolaðist upp í Tjernobyl, men hann var fleiri túsund kilometrar burturi. Ein tilsvarandi vanlukka í Barentshavinum kann gera nógv størri skaða, sigur Niels Bøhmer við Aftenposten.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Mubarak lovar nýskipanir

Tey seinastu 25 árini hevur egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, stýrt landinum at kalla einsamallur, men nú sigur hann, at fleiri politiskar nýskipanir eru á veg.

Forsetin sigur, at innan eitt ár verður grundlógin broytt, soleiðis at valdið hjá forsetanum verður skert, samtíðis sum stjórnin og tjóðartingið fáa størri vald og ávirkan. Lógarbroytingin skal eisini hava við sær, at andstøðan fær størri rásarúm, og tað fer helst at bera í sær, at tann stóri andstøðuflokkurin Tann Muslimski Bróðurskapurin verður viðurkendur sum politiskur andstøðuflokkur.

Hosni Mubarak hevur verið undir hørðum trýsti í mong ár, tí hann hevur verið at kalla einaráðandi í Egyptalandi, og tað ljóðar, at hann er í ferð við at skipa so fyri, at sonurin, Gamal Mubarak, skal taka við sum forseti.




Til nýggja spennandi klæðna- og gagnlistahandil okkara í Runavík, verður hervið søkt eftir handilskvinnum, ávíkavist fulla og hálva tíð.

**Vit vilja fegin at tit hava hesar eginleikar:**

- fryntligar- fyrikomandi
- álítandi- erligar
- áhugaðar í móta, innrætting og dekoratión
- kunnleika til handil, kundarøkt v.m.
- arbeiða sjálvstøðugt
- ný- skapandi/hugsandi
- hjálpsamar
- reinligar- ordiligar
- góð samstarvsevnir

Um tú heldur teg lúka hesi krøv, og hevur hug og hegni at hava eitt spennandi og mennandi arbeiði har móti, innrætting og ikki minst kundarøkt verður sett í hásæti, so send tína umsókn til:

***Anju Olsen***
***Postboks 1055***
***110 Tórshavn***

Um áhugaði ynskja at fáa meira at vita um hetta starv, eru tit vælkomin at ringja til **Anju á tlf. 522680** ella **Connie á tlf. 282155**

INDIRA

sansir.fo

**Leys størv**

**Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir stýrimonnum, hjálparfólki til maskinrúm, dekkara og kokki**

Við hesum verða fýra tíðaravmarkað størv lýst leys hjá Strandfaraskipum Landsins. Søkt verður eftir tveimum stýrimonnum, einum assistenti til maskinrúm og einum dekkara.

Søkt verður eisini eftir einum kokki til fast starv.

Freistin at søkja størvini er tann 5. oktober 2006 kl. 12.00

Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS